

# Fermingar-tilboð

Tosa við okkum…

**FORRÆTTUR:**

- Aspargessuppa
  við heimabakaðum breyði
- Klársuppa
  við kjøt- og mjølbollum og heimabakaðum breyði

**HØVUÐSRÆTTUR:**

- Heilstokt oksasteik
  við rómastúvaðum eplum, salati og reyðvínssós.
- Heilstokt lambstjógv
  við rómastúvaðum eplum, salati og reyðvínssós

**OMANÁ:**

- Íslagkøka
  við vaflum
- Fruktsalat
  við rákremi

Tilboð kr. **165,-** fyri hvønn.

Platform hevur yvirtikið alt virksemið við mati út úr húsinum hjá **Perluni.**
Tit kunnu sum vant bíleggja gott smurt breyð, grýturættir og allan veitsludøgurða á **tel. 31 50 61**

PLATFORM

# Seyðahundakapping í Vágum!

Leygardagin 14. september kl. 10.00 skipar Føroya Seyðahundafelag fyri hundakapping uppi í Vágadali vesturi í Sandavági.

Eftir kappingina verður skipað fyri veitslu fyri limir. Veitslan byrjar kl. 19.00. Tekning á tlf. 333710 ella 332006.

Seinasta freist at tekna seg er mikudagin 11. september kl. 19.00.

**Kjeld Nattestad**
**Mykines**

# PR-starvsfólk til SvF

Vit søkja eftir einum medarbeiðara at lýsa sjónvarpið í sjónvarpinum. Tú skalt leggja til rættis og framleiða lýsingar um sendingar okkara, kunna um skránna og røkja tekstvarp og heimasíðu okkara.

**Uppgávurnar:**
Tú skalt leggja til rættis og framleiða "reyp" (styttri innsløg um komandi sendingar), leggja til rættis upplýsingartiltøk í sambandi við teir ymisku tættirnar í virksemi sjónvarpsins og hava um hendur dagligu umsitingina av heimasíðu okkara. Tú skalt seta fokus á sendingar okkara og í samráð við leiðsluna leggja strategiina fyri lýsing sjónvarpsins av sær sjálvum og sínum virksemi.

Tú verður knýtt/ur at skrádeildini, sum hoyrir beinleiðis undir stjóran, men kemur at samstarva við allar deildir í húsinum. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt fjøltáttað og spennandi starv við fjølbroyttum uppgávum og nógvum avbjóðingum.

**Útbúgving og royndir:**
Tú hevur útbúgving innan fjølmiðlar ella lýsingargerð. Tú hevur so mikið av vitan um grafiska formgeving og sjónvarpsframleiðslu, at tú kanst viðgera og taka støðu til ítøkilig hugskot og geva grafikarum og myndafólki ítøki-ligar uppgávur. Tú dugir at hugsa strategiskt og leggja longri upplýsingar-átøk til rættis. Tú ert kreativ/ur og hevur lætt við at samstarva.

**Løn og setanartreytir:**
Starvið verður sett og lønt sum programmfólkastarv sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Starvið verður sett frá 1. oktober, 2002, ella skjótast gjørligt.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 18. september, 2002.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra, telefon 340400.

team85

**Sjónvarp Føroya**

*Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi umframt handilsligum virksemi.*

## Tvingsilssøla

**Hósdagin 3. oktober 2002, kl. 09.15** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 124c, Viðareiði (AS nr. 2-22/2002).**

Talan er um eitt óbygt grundøki, 821 m² til víddar. Eingin byggibúgving er farin fram á grundøkinum, sum liggur í bústaðarumráði, tætt við veg.

Víst verður annars til tvingsilssøluuppstillingina.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, (sak nr. 4431801)**, sum kann geva upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
10. september 2002

Sosialurin Sosialurin Sosialurin

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Sløkkiliðsmenn

Søkt verður eftir "leysum" sløkkiliðsmonnum til sløkkiliðið í Kollafirði.

**Høvuðsuppgávur**
eru sera fjølbroyttar, m.a. alt vanligt sløkkiliðsarbeiði, brunafyribyrgjandi arbeiði og bjargingar arbeiði.

**Førleikakrøv**
Roknað verður við, at tú innan 1 ár hevur sløkkiliðsprógv, førarabræv til akfar yvir 3.500 kg og víðkað fyrstahjálparprógv.

**Annað**
Umsøkjari má hava bústað og arbeiði í Kollafirði og nøktandi revsiváttan frá politinum.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett skjótast tilber, og lønt sambært avtalu millum Starvsmannafelagið og kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, tlf 314881 ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 30. september 2002.

SNARSKIVAN

# Felagið Agape

**Steen Palmquist,** familjuráðgevi og psykoterapeutur, talar í Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum
**fríggjakvøld 13. sept. kl. 20.00** um evnið:
*»Skuld – skuldarkensla yvir fyri Gudi, næstanum, mær sjálvum«*
og **sunnukvøldið 15. sept. kl. 19.00** um evnið:
*»Tann torføra vreiðin í ljósinum frá Guds Orði«*

**Innsavnan til Agape**
***Kvøldini eru almenn. Hjartaliga vælkomin!***



# Grillin á Fornagørðum, Pizzaria, Fortuna og Barok

GRILL & PIZZARIA á Fornagørðum

Frá 09. september hava vit opið soleiðis:

| | Grillin | Pizzaria |
|---|---|---|
| Mánadag til hósdag | 11.30-14.00<br>16.30-24.00 | 11.30-14.00<br>16.30-23.00 |
| Fríggjadag og leygardag | 11.30-14.00<br>16.30-02.00 | 11.30-14.00<br>16.30-23.00 |
| Sunnudag | 14.00-24.00 | 14.00-23.00 |

**Restaurant Fortuna**
Fríggjadag, leygardag og sunnudag kl. 18.00-23.00

Aðrar dagar bert til útleigan, min. 15 pers.

**Barok**
Fríggjadag og leygardag kl. 22.00-04.00

**Fortuna tlf. 457680**
**Grillin tlf. 457780**

# SØLUFÓLK TIL KØKSDEILDINA

**Køksmiðstøðin søkir eftir sølufólki at byrja beinanvegin.**

**Arbeiðsuppgávur**
- Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið veit hvat orðini service og kundatænasta merkja.
- Tú skal kunna hjálpa viðskiftafólki okkara við val av sniði, farvum, materiale o.m.a.
- Tú mást kunna hjálpa okkara viðskiftafólki við kreativum hugskotum.
- Fylgja teirra ynskjum við tínari servitan.

**Vit vænta…**
at tú ert ágrýtin, stinn/ur, dugnaligur og dugur at veita viðskiftafólkum okkara eina góða tænastu.
- Tú hevur royndir innan sølu og eyga fyri innrætting.
- Tú kennist við teldu.

**Vit bjóða tær…**
eitt áhugavert starv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Løn og treytir verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan **16.09.2002** og skal sendast til:

Køksmiðstøðin
Á Hálsi
110 Tórshavn
att: Vinjard Johansen

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at seta seg í samband við Vinjard Johansen, leiðara, á tel. 22 40 51.

Elkeyp
HTH Køksmiðstøðin
*Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30*

# Fíggjar- og umsitingar-leiðari í SvF

Starvið sum Fíggjar- og umsitingarleiðari í Sjónvarpi Føroya er leyst at søkja.

Fíggjar- og umsitingarleiðarin er settur beint undir og við tilvísing til sjónvarpsstjóran. Bygnaðurin á stovninum er flatur við eini stjórn við stápseindum, eini fíggjar- og fyrisitingardeild, eini framleiðslu- og tøknideild umframt programmdeildum.

Bygnaðurin í Sjónvarpi Føroya er seinastu árini munandi umskipaður; hetta er ein framhaldandi tilgongd, og fíggjarstýringin og mannagongdir annars verða støðugt tillagaðar bygnaðin. Komandi fíggjar- og umsitingarleiðarin má ganga undir treytirnar, at bygnaðurin framhaldandi kann verða broyttur.

**Starvið:**
Fíggjar- og umsitingarleiðarin hevur við ábyrgd mótvegis stjóranum dag-liga raksturin av stovninum um hendi, hvat viðvíkur fyrisiting og fíggjarstýring. Starvið fevnir soleiðis um:

- dagligt roknskapareftirlit
- starvsfólkaviðurskifti
- fyrisitingarligar mannagongdir
- dagligt keyp

Høvuðsuppgávur hjá fíggjar- og umsitingarleiðaranum eru at leiða og skipa fyri tí dagliga arbeiðinum á fíggjar- og fyrisitingardeildini og at leggja til rættis ársfíggjarætlanir og langtíðar fíggjarætlanir innan teir karmar, sum stovnurin hevur at virka undir. Ein týðandi leiklutur hjá fíggjar- og umsitingarleiðaranum er at virka sum samstarvspartur bæði hjá stjóranum og hinum deildarstjórunum í øllum fíggjarligum og fyrisitingarligum málum.

Sum er, er fíggjar- og umsitingarleiðarin virkandi stjóri, tá sjónvarpsstjórin er burturstaddur ella hevur forfall.

Arbeiðsuppgávurnar fevna um:
- dagligu roknskaparførsluna og at gera deildarroknskapir
- at seta upp roknskapir fyri tíðarskeið og ársroknskapir
- at hava um hendi rakstrar- og gjaldførisætlanir
- at skipa fyri mannagongdum á øllum fyrisitingarligum økjum
- leiðsluna av móttøkuni og skrivstovuni
- ábyrgd av ognunum, sum stovnurin húsast í

**Umsøkjarin:**
Starvið er avbjóðandi og spennandi, og hevur tú hug at royna teg krevst, at tú hevur lokið búskaparligt embætisprógv ella hevur aðra samsvarandi útbúgving. Viðkomandi royndir innan fíggjarstýring, fyrisiting og leiðslu hava eisini áhuga.

Tað er avgerandi, at tú sum umsøkjari ert opin, hevur ein liðiligan hugburð og hevur góð samstarvsevni. Í starvinum krevjast evni at arbeiða sjálvstøðugt og at taka avgerðir og at duga at kommunikera hesar á ein hátt, sum elvir til loysnir og framburð.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknir við CV, viðmælum, prógvum og øðrum viðkomandi skjølum skulu verða Sjónvarpi Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi tann 1. oktober 2002.
Ætlanin er at seta starvið 1. november 2002 ella skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra ella Finn Lómstein, fíggjar- og umsitingarleiðara, telefon 340400.

Tórshavn, 10. september 2002

Sjónvarp Føroya
M.A.Winthersgøta 2
Postboks 21
110 Tórshavn

team85

**Sjónvarp Føroya**

*Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi umframt handilsligum virksemi.*